


## Katrin Olsen gevst

Tann fyri føroyska kapprógving so spennandi tíðin við Katrini Olsen og Juliane Elander Rasmussen er liðug. Katrin, sum er vorðin lækni, fer nú at savna seg um læknayrkið, skrivar Róðrarfelagið Knørrur. Bátsfelagi Katrinar, Juliane Elander Rasmussen, heldur fram í elitukappróðri og hevði tí brúk einum avloysara, og tað kann ikki vera hvør sum helst, tá man bestillur billett til OL. Avloysarin er funnin og eitur Anne Lolk, og hon er eingin hvølpur, tí sum fjórfaldur heimsmeistari í maratonrógving og eini glitrandi mongd av altjóða heiðursmerkjum í fikkuni, má hon sigast at vera ein ógvuliga virðiligur og kompetentur avloysari.

### Tjaldur-Stjørnan 23-23 (12-16):

# Endaði við semju...

**Hóast upptaktin var heldur rokalig, fingu áskoðararnir ein javnan og spennandi dyst millum oddaliðini bæði, tá tey spældu ásettu tíðina í Runavík í gjár**




Hilmar Jan Hansen



Undan oddadystinum millum Tjaldur og Stjørnuna í gjár var øgiligt rok um flyting av dystinum og hvør vildi hvat og ikki. Men hóast talan helst mest var um misskiljingar og illveður í einum vatnglasi, so endaði málið við semju á vøllinum, tí javnleikur gjørdist úrslitið.

Og hóast tað hevði ljóðað, at Tjaldur nóg illa fekk mannað lið, líktist manningin øgiliga nógv tí vanliga. Størsta broytingin var helst, at Alina Olaru Anghel, sum hevur verið í barsil, var við aftur og spældi á strikuni hjá teimum í Runavík.

Yvirhøvur var talan um ein javnan og spennandi dyst, og fyrstu 20 minuttirnar fylgdust tey upp á 10-10. Men so fekk Stjørnan meira vind í seglini løtuna undan steðginum, so fýra mál gjørdust á muni. Hesin munur var tó etin uppaftur beinanvegin í seinna hálvleiki, tá Tjaldur hevði eina góða løtu at byrja við.

Onkursvegna tóktist tað, sum vóru spælararnir hjá Stjørnuni ikki líka tendraðir sum teir hjá Tjaldri, ið óivað vildu vísa, at óstøðugu úrslitini í síðstuni høvdu líka nógv við tað at gera, sum er hent uttan fyri vøllin.

Ímóti endanum gjørdist sera spennandi, men líkt var til, at Stjørnan skuldi fara avstað við øllum. Men Guðrun í Lágabø tók tvey brotskøst, umframt at hon hevði avgerandi bjarging í næstseinasta álopinum, tá Stjørnan kundi økt munin upp í tvey mál.

Í staðin fekk Annika Thomsen javnað í evstu løtu, so tí er enn einki avgjørt í oddanum á Sunset-kappingini, har tað tó framvegis er greitt, at allir dystir millum hesi bæði liðini eru forsmakkur upp á FM-finalurnar hetta kappingarárið.

### Fakta um dystin

**Tjaldur-Stjørnan 23-23 (12-16)**
**10 min:** 4-4
**20 min:** 9-10
**40 min:** 17-19
**50 min:** 22-21
**Málskjúttar**
**Tjaldur:** Adina Petrea 8 (4), Cornelia Rimbu 8, Annika Thomsen 3, Hanna I. Højgaard 2, Benadikta Johannesen 2
**Stjørnan:** Valentina Suciu 7 (3), Simona Petersen 5 (2), Durita Christophersen 3, Joan M. Djordjevic 3, Edith Hansen 2, Anna Kristina Samson 2, Una Olsen 1
**Brotskøst:** Tjaldur 4, Stjørnan 7
**Útvísingar:** Tjaldur 4, Stjørnan 3
**Dómarar:** Hans Thomassen & Eyðun Samuelsen

# Avaras var áskoðari

**Enn er arbeiðsloyvið hjá litaviska venjaranum ikki komið í rættlag, og saman við einum nýggjum spælara mátti hann vera áskoðari á Hálsi**




Jákup Mørk

VB kundi annars undan vikuskiftinum boðað frá, at Avaras Daugas nú aftur skal vera venjari hjá hondbóltskvinnunum í Vági. Tann sessin hevur Gurið Mortensen annars røkt, men hon hevur sagt seg frá, nú barnsburðurin av álvara stundar til.

Umframt Avaras, sum áður hevur verið við til at vinna FM við VB-kvinnunum, kemur ein litaviskur spælari eisini til VB, men eisini hendan mátti sita sum áskoðari í Havn.

Teir báðar komandi dystirnar skal VB spæla á heimavølli móti VÍF og StÍF, og úrtøkan í hesum dystunum verður avgerandi fyri, um VB skal spæla hondbólt í bestu ella næstbestu deildini komandi kappingarár.

### Neistin-VB 39-19 (20-12):

# VB við í eitt korter

**Botnstøðið hjá VB er framvegis ov lágt, og so var einki at gera móti Neistanum, sum vann trivaligan stórsigur**




Jákup Mørk

Eftir at tær púrasta óvæntað taptu móti VÍF í miðvikuni, sóu Neistakvinnur ikki heilt álvuligar út fyrstu løtuna móti VB.

VB fylgdi væl við í dystinum, og serliga tóktist strikuspælið hjá gestunum at geva Neistanum trupulleikar.

VB hevur tó eisini sínar trupulleikar. Fyrst og fremst er hópurin smalur og ungur, og hartil hevur liðið ikki skjúttan, sum kann opna mótstøðuverjuna.

Tí eydnaðist tað Neistanum at fáa verjuna upp at koyra hampuliga skjótt, og so var ikki nógv hjá VB at gera. Fríða Petersen í Neista-málinum hevur helst besta útkastið í føroyskum hondbólti yvirhøvur, og tað stóð ikki á hjá henni at senda hópin av kontrabóltum avstað, soleiðis at VB seinna partin av fyrra hálvleiki varð runnið niður og norð.

Eftir steðgin var eingin spenningur í longur, og hetta vistu tær hjá VB eisini. Tað gav Neistanum lætt spæl, og tað eydnaðist teimum eisini at vinna seinna hálvleiki somikið sannførandi sum 19-7!

### Fakta um dystin

**Neistin-VB 39-19 (20-12)**
**10 min:** 5-4
**20 min:** 12-9
**40 min:** 27-14
**50 min:** 33-18
**Málskjúttar**
**Neistin:** Unnur Danielsen 8, Lina Andriulyta 6(1), Marjun F. Danberg 6, Anja Heinadóttir 5, Katrin á Neystabø 4(1), Rakul Augustinussen 3, Jacklin Durhuus 3, Louisa Andreasen 1, Elin Staksund 1, Bára Simonsen 1
**VB:** Una Egilsdóttir 7(1), Bára Mortensen 4, Sára Samuelsen 3, Svava Vestergaard 2, Andrea Nielsen 1, Teresa Joensen 1, Christina Holm 1
**Brotskøst:** Neistin 2, VB 3
**Útvísingar:** Neistin 1, VB 3
**Dómarar:** Dánjal Samuelsen & Heri Petersen